**El-in  - Goymsluleiðari**

Hevur tú góðan sans fyri skipan, ábyrgd og samstarvi? Vit leita eftir einum dugnaligum og álítandi goymsluleiðara, sum skal hava høvuðsábyrgdina av okkara goymslu og vøruflutningi til el-deildina.

**Arbeiðsuppgávur**

Sum goymsluleiðari fert tú at hava ábyrgd av:

- At bíleggja vørur til el-deildina.
- At taka ímóti vørum og skráseta tær í bókhaldsskipanina.
- At avgreiða vørur til okkara viðskiftafólk.
- At syrgja fyri, at goymslan altíð er væl skipað, rein og ruddilig.
- At vera við til at menna og bøta um arbeiðsgongdir á goymsluni.

**Vit vænta, at tú**

- Ert skipað/ur og arbeiðir sjálvstøðugt.
- Hevur góð samstarvsevni og ert tænastusinnað/ur.
- Hevur telduførleikar á brúkarastøði.
- Hevur ábyrgdarkenslu og eyga fyri smálutum.
- Royndir við goymsluarbeiði, innkeypi ella el-arbeiði eru ein fyrimunur, men ikki eitt krav.

**Vit bjóða**

- Eitt sjálvstøðugt og fjølbroytt starv.
- Góðar arbeiðsumstøður í einum góðum arbeiðsumhvørvi.
- Møguleika fyri fakligari menning.
- Starvsbyrjan eftir nærri avtalu.

**Løn**

Løn eftir avtalu.

**Umsókn og nærri upplýsingar**
Nærri upplýsingar um starvið fáast við at seta seg í samband við Hilmar á tlf 284500 ella senda spurningar í maili á hilmar@el-in.fo

Vit gleða okkum at hoyra frá tær.